# Næstu seks vikurnar mugu suðuroyingar vera lagaligir

*–Tær næstu seks vikurnar verður tað strævið at ferðast ímillum Suðuroynna og Havnina. Stjórin á Strandferðsluni vónar, at suðuroyingar skilja støðuna*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tær næstu seks vikurnar verður suðuroyggin mestsum strikað av Føroyakortinum.

Tað halda bæði býráðsformaðurin í Vági og á Tvøroyri.

Sostatt hava teir ikki so øguliga stórt álit á ensku ferjuni Claymore, sum skal røkja ferðasambandið ímillum Suðuroynna og Havnina tær næstu seks vikurnar

Smyril er nú á beding á Skála og samstundis verður enska ferjan Claymore sett í rutusigling ímillum Havnina. Tað er væl minni enn Smyril, og tað eru mong, sum stúra fyri, at hon fer ikki at klára allan flutningin, sum er ímillum Suðuroynna og Havnina.

Stjórin á Strandferðsluni, tann, at hetta var einasta skip, sum fást kundu. Og eydnaðist tað ikki at faá Claymore í evstu løtu, so var onki skip yvirhøvur at seta í Suðuroyarsiglingina og tað hevði rætt og slætt verið ein vanlukka.



*Claymore skal sigla sín fyrsta túr ímillum Havnina og Suðuroynna í kvøld, tá ið hon fer av Havnini og suður á Tvøroyri. Myndin er úr salongini, har umstøðurnar eru góðar, men hon brúkar ein hálvan tíma longri um túrin, enn Smyril*

til forargilsi hjá nógvum.

Eitt nú vónar hann, at fólk skilja støðuna og ikki taka tað ov illa upp, um tað ikki altíð eydnast at sleppa við, akkurát tá ið tey vilja.

Hann heitir eisini á fólk um at lata bilin standa, um

Men sum støðan var, var onki annað at gera, tí vit fingu ikki játtanina frá løgtinginum fyrrenn beint nú, leggur hann afturat.

Og Smyril, hann skal vera liðugur til Jóansøku. Um neyðugt verður arbeitt bæði

sum tey vilja, sigur Jógvan Krosslá í Vági.

Dan Nielsen á Tvøroyri heldur ikki tað verða ómakin vert at gera fleiri viðmerkingar til málið, tí tað er longu so nógv sagt og skrivað, hóast alt var til fánýtis.

Men teir eru báðir samdir um, at hetta er politiskur kleyvarskapur.

– Tað tekst ikki frá Strandferðsluni, at hon gjørdi vart við trupulleikan í góðari tíð og bað um eykajáttan til endamálið, siga teir báðir. Og teir halda, at tað er skammiligt, at tað skuldi enda soleiðis, hóast øll vistu av tí í góaðri tíð. Teir spyrja, hví løgtingið ikki akkurát tað sama kundi játta Standferðsluni peningin á jólum, ístaðin fyri at játta hann nú - tá ið tað var ov seint.

**Flutti yvir 1000 bilar.**

Og tað skerst ikki burtur, at tey, sum stúra fyri gongdini hava hagtølini í sínum parti.

Claymore tekur 50 persónbilar ella sjey treylarar uppá 12 metrar hvør.

Tað gevur í mesta lagi 700 persónbilar ella 98 treylarar um vikuna uppá 12 metrar.

Manningin á Smyrli upplýsir at í farnu viku flutti Smyril 1.000 persónbilar, 60 bingjur uppá seks metur hvør, 10 bingjur uppá 12 metrar hvør, umframt 25 treylarar uppá 12 metrar hvør.

Harumframt flutti Smyril heilt nógvar lastbilar.

Og lagt verður afturat, at hetta er vanligur flutningur hesa árstíðina, so tað er ikki frítt, at manningin á Smyrli stúrir eitt sindur fyri, hvussu tað fer at ganga.

– Sum allaroftast er dekkið á Smyrli heilt fult hvønn einasta túr og tað er er eitt ordiligt pusslispæl at lasta og stúva hann rætt so at alt sleppur við, siga teir.

Ikki minst eru teir ivasamir, sum arbeiða á dekkinum, tí tað verða teir, sum koma at standa fremst fyri, tá tað ikki gongur eftir vild hjá ferðafólki. Annars er serlig ferðaætlan løgd fyri Claymore og eftir henni verður ikki silgt á Vág hesa tíðina. Men ferðaætlanin er yvirhøvur løgd soleiðis, at suðuroyinar kunnu vera eins leingi Í Havn, sum tá ið Smyril siglur. Hon er eisini samskipað við Bygdaleiði, sjóleiðir og flúgvara.



*Á biladekkinum tekur Claymore bara helvtina av tí, sum Smyril tekur og stóri spurningurin er, um hon klárar at føra alt. Í seinastu viku førdi Smyril tilsamans 95 trailarar og bingjur, umframt 1.000 persónbilar og heilt nógvar lastbilar og tað er tvær ferðir so nógv, sum Claymore hevði klárað at ført. Tí hon hevði bara klárað 700 persónbilar*

Reidar Nónfjall, væntar, at tað fer at ganga, um enn tað skal lagaligheit til frá øllum pørtum.

Claymore tekur ikki meiri enn helvtina av tí farmi, sum Smyril tekur, men hann vónar at suðuroyingar skilja støðuna og góðtaka hetta sum eina neyðloysn ímeðan Smyril er í dokk.

–Og eg má enn einaferð minna á alternativið og tað hevði verið uppaftur verri.

– Tí støðan er nevniliga

Hesi vanlukkuni væntar hann at sleppa undan, nú Claymore skal sigla, tí hon tekur hóast alt nokk so fitt av farmi og fólki.

Ferðaætlan er lýst og eftir henni skal Claymore sigla tvær ferðir um dagin ímillum Havnina og Suðuroy.

– Sostatt fáa vit flutt 600 ferðafólk og 100 bilar, ella 12-14 trailarar um dagin.

So nakran ruðuleika væntar hann ikki, tó at okkurt verður, sum fer at elva

tað ikki er avgjørt neyðugt at taka hann við.

–Støðan er ógvuliga harmilig. Tað er harmiligt, at fólk ikki sleppa at ferðast, sum tey vilja. Tað er eisini harmiligt, um tað verður neyðugt at avlýsa ymisk tiltøk tí at ferðasambandið er so vánaligt.

– Men tað er eisini harmiligt fyri Strandferðsluna, tí vit missa eisini stórar inntøkur, tá ið fólk ikki fáa ferðast, sum tey vilja.

um kvøldið og um náttina, sigur Strandferðslustjórin

**Strikað av kortinum**

Hinvegin halda bæði býráðsformaðurin í Vági og á Tvøroryi, at hetta er mestsum at strika Suðuroynna av Føroyakortinum.

Teir siga, at støðan er als ikki nøktandi, tí teir ivast ikki í, at proppur kemur í ferðasambandið.

– Tað er nógv fyri, at fólk ikki skulu sleppa at ferðast,

*Ferðaætlanin til Suðuroynna broytt:*

## Náa ikki flúgvaran 4 dagar um vikuna

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað fær ikki bara avleiðingar fyri ferðasambandið ímillum Havnina og Suðuroynna, at Smyril nú skal í dokk, og at eitt nógv minni skip skal sigla fyri hann í seks vikur, hetta til Jóansøku.

Tað fær eisini avleiðingar fyri teir suðuroyingar, sum skulu uttanlands.

Nú Claymore skal sigla, er nýggj ferðaætlan løgd, sum leggur upp fyri, at skipið bæði er minni, og siglur seinni enn Smyril. Eftir teirri fyribils ferðaætlanini skal Claymore sigla av Tvøroyri tríggjar morgnar um vikuna klokkan seks.

Tað eru mánamorgun, fríggjamorgun og sunnumorgun. Hinar fýra dagarnar, týsdag, mikudag, hósdag og leygardag, siglur Claymore av Tvøroyri klokkan 7.

Men hann hevur næstan tríggjar tímar um at sigla norður til Havnar, og tað ber í sær, at hesar dagar sleppa suðuroyingr ikki við flúgvaranum, uttan at fara norður dagin fyri.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hetta er ein spurningur, sum tey hava hugsað sera nógv um. Men vit komu til ta niðurstøðu, at tað er ov strævið fyri suðuroyingar, um Claymore skal sigla hvønn morgun kl. 6. Annars er fiskatúrurin av Drelnesi hóskvøld fluttur fram frá kl. 19 til kl. 18.30 og hann er samstundis gjørdur til farmatúr burturav.



*Norskur stórtingslimur:*

# Blakið Paul Watson aftur til havs

*Føroyingar eiga at gera alt, sum er møguligt fyri at forða fyri, at Paul Watson nærkast grindadrápi. Uttan blóð á myndunum minkar inntøkan hjá Watson, og tað eru pengar, ið eru tann drívandi megin hjá honum, sigur Steinar Bastesen, kendur hvalaveiðumaður og limur í norska Stórtinginum*

JÓGVAN HUGO GARDAR, OSLO

Steinar Bastesen hevur í nógv ár staðið á odda fyri norskum hvala- og kópaveiðumonnum. Flestu djóraverndarfelagsskapir, sum Greenpeace og Sea Shepherd, hava brúkt Bastesen sum sína ímynd upp á óndskapin, sum fólkasløgini í norðuratlantshavi fremja móti havsins súgdjórum. Steinar Bastesen er í dag fólkavaldur og situr í Stórtinginum umboðandi Strandaflokkin (Kystpartiet). Hann bert ristir við høvdinum, tá vit fortelja, at nú ger Watson seg til at fara í hernað móti føroyingum og grindadrápinum.

- Tað fyrsta tit eiga at gera er at syrgja fyri, at sjóverjan er brynjað til at taka ímóti Watson og hansara harkaliði. Og ger hvat sum helst fyri at forða honum atgongd til føroyska havn. Eisini eiga tit at nokta honum atgongd til føroyskt sjóøki. Er lóggáva ikki fyri at nokta honum atgongd, so er at broyta lógina sum skjótast. Føroyingar hava loyvi at verja seg móti yvirgangi móti eini lógligari og burðardyggari hvalaveiðu, sigur Steinar Bastesen.

Hann heldur, at føroyingar als ikki eiga at vera bangnir fyri at Føroyar skulu koma í ringt orð úti í heimi, um teir steingja dyrnar fyri Paul Watson og hansara skipi.

- Paul Watson er óynsktur í Íslandi, og í Noregi er hann eftirlýstur fyri yvirgang. Tað skal bara mangla, at føroyingar ikki eisini skulu kunnu geva honum greið boð um at fara heimaftur.

**Finnið fram gomul gørn**

Fyri norska hvalaveiðumannin er tað ikki ókent at stríðast móti einum manni, sum Paul Watson. Hansara ráð til føroyskar grindamenn eru klár.

- Farið í neystið og finnið fram gomul gørn og gamlar endar. Takið hettar við umborð, og kemur Paul Watson og skip hansara nærhendis grindaflokkinum og føroysku bátunum, syrgið fyri at kasta hettar fyri skrúvuna á amerikanska hirðanum. Best er sjálvandi, um ein veirur kann fáast um skrúvuna. Tá kann sjóverjan bara festa veirin umborð og toga Watson til havs aftur. Minnist til, at her er ætlanin at forða fyri at føroyingar skulu veiða ein, hval sum ikki er hóttur, og eingi forboð finnast móti hesi veiðu í altjóða felagsskapum.

Steinar Bastesen sigur, at føroyingar eisini mugu ansa eftir, at Paul Watson og Sea Shepherd ikki koma nærhendis einum møguligum grindadrápi, har smáir bátar eru staddir.

- Fyri Paul Watson hevur tað stóran týdning at fáa myndir av sær sjálvum og Sea Shepherd merkinum knýtt at einum grindadrápi, har sjógvurin er reyður og blóðið sproytar. Tá kann hann fara út og lokka meir pengar burturúr stórbýarfólkum, sum halda tað vera ræðuligt, sum fer fram í Føroyum. Tað kemur ikki fyri, at hesir felagsskapir fortelja óvitandi, pengasterkum fólkum um veruleikan aftan fyri til dømis grindadráp. Einki verður sagt um, at hetta er ein burðardygg veiða av einum djóri, sum tað er nógv til av.

**Mynd av sóknaronglinum**

Steinar Bastesen er ikki í iva um, at einasta endamál við



*Steinar Bastesen er ikki í iva um, at einasta endamál við ferðini hjá Watson er eginlýsing og ikki at verja grindahvalin*

ferðini hjá Watson er eginlýsing og ikki at verja grindahvalin.

- Tað sum er av størsta týdningi er at syrgja fyri, at halin av tíðindafólkum sum koma við Watson ikki fáa høvi til at taka myndir av grindadrápinum, grindaknívinum, sóknaronglinum og einum føroyingi, sum tekur lívið av einum hvali. Helst vil hann eisini hava lýst óvitar sum blóðtystar drápsmenn. Fær hann ikki hesar myndirnar, so er herferðin fullkomiliga miseydnað, og pengarnir koma ikki inn í kassan. Teir bara renna út.

Steinar Bastesen sigur, at eitt tað besta dømi um, hvussu lítið hesir felagsskapirnir vita um havsins súgdjór, er tíðspunkti, Watson hevur valt at fara til Føroyar.

- At Sea Shepherd hava valt juni og juli til at steðga grindadrápinum prógvar, hvussu lítið tey vita um hesa veiðu. Paul Watson hevur blandað saman grindadráp og norsku hvalaveiðuna. Vit skjóta hval í juni og fyri ein part í juli, men grindahvalurin kemur jú ikki nær landi fyrrenn í august. Hetta vísir eina fyrireiking, sum er burturúr vón og viti.

- Eg havi als einki til yvurs fyri Paul Watson, Greenpeace og øllum hasum djóraverndarfelagskapunum, sum bert hava til endamáls at tjena pengar. Felagsskapirnir eru als ikki áhugaðir í at verja djórini. Tey vera bert brúkt fyri at fáa pengar inn í kassarnar, sigur Steinar Bastesen.

**Stevnir Greenpeace**

Hann fyrireikar nú eina stevning móti Greenpeace, tí felagsskapurin hevur brúkt Bastesen í eini kampanju, har hann verður vístur fram sum ein vandamikil drápsmaður, sum aftur kann drepa. Samstundis verður Bastesen tengdur at fólkum á uttarsta høgraveingi.

- Hetta er bert enn eitt dømi um, hvat hesir felagsskapir gera fyri at súgva pengar burturúr óvitandi stórbýarfólki og øðrum, sum ikki vita, hvat er satt í hesum málinum. Hvalir og kópar eta fleiri ferðir tann toskin, vit og aðrar tjóðir fiska, men eingin skal fáa loyvi at halda kópa- og hvalastovnarnar á einum lægri støði. Nú vilja tey eisini steðga toskaveiðuni, tí stovnurin skal vera hóttur. Hetta líkist ongum, og hvalaveiðutjóðirnar eiga at standa saman í stríðnum móti lygnum og ósannindum um hesa veiðu.




*Í juni í 1986 handtók løgreglan í Havn fólk frá Sea Shepherd*

## Atkvøðurætt til løgtingsval er treytin til fólkaatkvøðuna

*Landsstýrið fer at leggja uppskot til lóggávu fyri tingið um fólkaatkvøðu, har ásetingar verða gjørdar um hetta. Spurningurin er ikki endaliga viðgjørdur og ymiskar meiningar eru í landsstýrinum um, hvat uppskotið skal vera, sigur Høgni Hoydal í svari til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI

Heðin Mortensen, løgtingsmaður Sambandsfloksins, setti herfyri Høgna Hoydal, landsstýrismanni í sjálvstýri, seks spurningar í sambandi við fullveldisætlanina. Fyrst vildi Heðin Mortensen hava at vita, hvussu nógv fólk hava verið og eru í starvi í sambandi við málið, og svarar Høgni Hoydal, at 2 fólk eru beinleiðis starvssett hjá landsstýrinum í sambandi við sjálvstýrismál.

Og viðvíkjandi spurninginum um PR-fólk, sigur Høgni Hoydal, nei, onki fólk er sett í starv í Danmark fyri at gera PR-arbeiði fyri fullveldinum.

– Kann landsstýrismaðurin upplýsa fyri tinginum, hvat fullveldisætlanin higartil hevur kostað, og hvussu nógv hon í framtíðini fer at kosta ? spyr Heðin Mortensen í fjórða spurningi, og Høgni Hoydal svarar, at í fíggjarárinum 98 vórðu 463.000 kr nýttar til sjálvstýrismál, í 99 5.441.000 krónur, og í figgjarárinum 2000 eru 487.714 kr higartil nýttar. Í ár eru annars játtaðar 5,08 milliónir kr til sjálvstýrismál, og sjálvstýrismál hava sostatt higartil kostað 6.487.714 kr; meðan økið við árslok fer at hava kostað 10.984.000 kr. hesi 3 árini tilsamans, sigur Høgni Hoydal.

**Ikki ábyrgd landsstýrisins**

– Hevur landsstýrið ætlanir um at geva andsstøðuni sama møgulleika, at kunna um alternativar møguleikar til fullveldisætlanina (her verður hugsað um tekniskar- og fíggjarligar møguleikar), spyr Heðin Mortensen, og sjálvstýrismálaráðharrin svarar, at tað er landsstýrisins ábyrgd at kunna um síni politisku mál. Tað er ikki landsstýrisins ábyrgd at leggja til rættis ella fíggja kunning um onnur mál enn tey, landsstýrið stendur fyri.

– Men kortini er ætlanin, at saman við lógaruppskotinum um fólkaatkvøðuna verður eitt uppskot um eykajáttan til stuðul til flokkar og møguligar felagsskapir, sum ynskja at kunna upp til fólkaatkvøðuna, so her fara tey sum eru fyri og tey sum eru ímóti at hava eins góðar møguleikar, sigur Høgni Hoydal.

**Atkvøðurætt**

Og viðvíkjandi spurninginum um atkvøðurætt á fólkaatkvøðuni miklu um framtíðarstøðu Føroya, sigur Høgni Hoydal, at hetta er ein spurningur, sum løgtingið ger av.

– Landsstýrið fer at leggja uppskot til lóggávu fyri tingið um fólkaatkvøðu, har ásetingar verða gjørdar um hetta. Spurningurin er ikki endaliga viðgjørdur og ymiskar meiningar eru í landsstýrinum um, hvat uppskotið skal vera. Eisini eru nógvir løgfrøðisligir trupulleikar tengdir at hesum. Tá landsstýrið er spurt um hetta hava vit svarað, at tað mest sannlíka er, at tað vera tey somu sum tey, ið hava atkvøðurætt til løgtingsval, sigur Høgni Hoydal m.a. í svarinum til spurningarnar frá Heðin Mortensen.